HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Kommunala brennistøðin
Postrúm 226
Sandvíkarhjalli
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, hin 25. august 2005
Málnr.: 614-199900629-44
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE / Tlf.: 35 64 20

**Umhvørvisdeildin**

# Umhvørvisgóðkenning
# fyri
# Tyrvingarplássið í Húsahaga

## Heimild

Hendan umhvørvisgóðkenning av Tyrvingarplássinum í Húsahaga, matr. nr. 1175a í Tórshavn, er givin við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og grein 1, stk. 4, í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

## Endamál

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av luft, vatni og jørð, og at fyribyrgja larmvansum.

## Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk hin 1. september 2003 umsókn við tekningum um endurnýggjan av umhvørvisgóðkenningini av tyrvingarplássinum í Húsahaga. Seinni er eisini søkt um góðkenning til víðkan av plássinum innan fyri verandi hegngirðing.

## Lýsing av virkseminum

Tyrvingarplássið í Húsahaga er 31400 $m^2$ til støddar. Tyrvingarplássið liggur umleið 20 metrar undir vatnveitingarbrunninum hjá Tórshavnar kommunu við eini fjarstøðu á 450 m. Á plássinum verður flogøska og ilska tyrvd, umframt vanlig tyrving.

## Málsviðgerð

Tyrvingarplássið í Húsahaga varð fyrstu ferð umhvørvisgóðkent hin 25. februar 1993. Umhvørvisgóðkenningin varð endurnýggjað hin 3. mars 1999. Tá varð flogøsku- og ilskuøkið víðkað frá 4300 $m^2$ til 9600 $m^2$. Ein umskiping av økinum er gjørd í 2003 og 2004 innan fyri verandi verjugarð, umframt ein víðkan í 2005, sum eisini er innan fyri verandi verjugarð.

Falkavegur 6, 2. sal
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Grundarlagið undir málsviðgerðini er umsóknin, saman við eftirlitsvitjanum og tí samskifti, sum hevur verið. Millum annað hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan móttikið dagførdar tekningar av plássinum. Sí HS mál nr. 199900629.

**Góðkenningartreytir**

Umhvørvisgóðkenningin er treytað av ásetingunum í fylgiskjali 1.

**Kæruvegleiðing**

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin í umhvørvismálum við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Hjálagt:**

Fylgiskjal 1 Góðkenningartreytir fyri tyrvingarplássið í Húsahaga
Fylgiskjal 2 Listi yvir burturkast, sum skal beinast til ávikavist:
Brenningar, tyrvingar, serviðgerð ella endurnýtslu
Fylgiskjal 3 Sýnistøka og markvirði fyri tyrvingarplássið í Húsahaga

**Avrit:** Tórshavnar kommuna, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn

# Fylgiskjal 1
# Góðkennningartreytir fyri tyrvingarplássið í Húsahaga

## 1 Innrætting

1.1 Tyrvingarplássið skal rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar altíð verða hildnar.
1.2 Øll øki, sum hoyra til tyrvingarplássið, skulu haldast ruddilig.
1.3 Øki, sum hoyra til tyrvingarplássið, skulu verða týðiliga avmerkt.
1.4 Tyrvingarplássið skal hava seyðatætt hegn og hava portur, sum kann læsast.
1.5 Við tilkoyringina til tyrvingarplássið skal uppsetast skelti, sum lýsir, hvør hevur ábyrgdina av plássinum, eftirlit v.m.
1.6 Áir og løkir skulu við grøv leiðast uttanum plássið soleiðis, at einki vatn rennur inn á tyrvingarplássið.
1.7 Plássið skal innrættast soleiðis, at regnvatn ikki savnast á plássinum.
1.8 Alt frárensl frá tyrvingarøkinum skal leiðast í ein savningarbrunn við møguleika fyri sýnistøku. Um innihaldið av olju í spillivatninum fer uppum markvirði, skal oljuskiljari setast eftir savningarbrunnin og frammanfyri sýnistøkubrunnin.
1.9 Frárensluvatn (perkolat) frá flogøsku- og ilskuøkinum skal hava serskilt lokað frárensl við møguleika fyri uppsamling og sýnistøku.
1.10 Frárensl frá tyrvingarplássinum má ikki vera atkomiligt hjá seyði o.ø., men skal innilokað leiðast frá plássinum í rør og beinleiðis í kommunalu kloakkskipanina.
1.11 Útleiðingin frá plássinum skal halda ásett markvirði, sum fyrisett í fylgiskjali 3.
1.12 Flowið í frárenningini frá plássinum skal mátast við flowmetri.
1.13 Tyrvingarplássið skal eftir umbøn vera atkomiligt hjá eftirlitsfólki frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni alt árið.

## 2 Tyrvingarlutir

2.1 Loyvt er at tyrva tilfar, vísandi til fylgiskjal 2, pkt. 2.
2.2 Ikki er loyvt at goyma ella tyrva serliga dálkandi burturkast (sambært fylgiskjali í kunngerð nr. 147 frá 19.10.1995 um burturkast), burturkast, sum skal brennast, ella burturkast, sum kann endurnýtast, um onnur avtala ikki er gjørd við Heilsufrøðiligu starvsstovuna.
2.3 Brúnsteins- og alkalisk battaríir innihaldandi minni enn 0,025% Hg kunnu tyrvast í hartil hóskandi posa nærhendis flogøskuøkinum. Økið skal vera væl avmerkt á korti.
2.4 Asbest skal tyrvast á øki, sum er væl avmerkt á korti.
2.5 Flogøska og ilska skulu tyrvast á øki, sum er væl avmerkt á korti.

## 3 Rakstur

3.1 Tá ið burturkastið er komið á plássið, skal tað tyrvast við í minsta lagi 20 cm av tyrvingartilfari, skjótast gjørligt og í seinasta lagi á endanum á hvørjum degi.
3.2 Tyrvingarrampan má ongantíð koma omanyvir drenskipanina fram við verjugarðinum, niðast undir plássinum.
3.3 Flutningur av flogøsku og ilsku frá brennistøðini og til tyrvingarplássið má ikki hava dálking við sær og skal fara fram í innilokaðari last ella bili.
3.4 Ilskan skal vætast væl, áðrenn hon verður vippað á tyrvingarøkið.
3.5 Flogøskan skal tyrvast í hartil hóskandi sekkjum.
3.6 Sekkirnir skulu handfarast so, at teir ikki skrædna. Um sekkur skrædnar, kann hann tyrvast saman við ilskuni.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

3.7 Flogøskusekkirnir skulu tyrvast so skjótt eitt rað er fylt upp. Framsíðan á raðnum kann haldast ber, so næsta raðið kann setast upp á pláss.
3.8 Sum tyrvingartilfar kann nýtast mold, eyrur og annað líknandi tilfar; spillivatnsevja kann eisini nýtast, tó við serligum loyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
3.9 Burturkast má undir ongum umstøðum finnast uttanfyri plássið, og Tórshavnar kommuna hevur ábyrgd av, at ruskið verður tikið inn á plássið og beint burtur eftir galdandi reglum.
3.10 Tórshavnar kommuna hevur ábyrgd av, at plássið er læst, tá ið ongin er á staðnum, og at t.d. seyður ikki sleppur inn á plássið.
3.11 Tá ið tyrvingarplássið er opið, skal tað verða mannað við fólki, sum hava førleika í handfaring av burturkasti.
3.12 Tyrvingarplássið skal fyllast upp til eina ávísa hædd. Støðið fyri hægstu tyrving skal altíð vera undir botnstøðinum á vatnveitingarbrunninum í Villingardali og avsluttast við í minsta lagi 1 metri av mold, og gras skal sáast soleiðis, at minst møgulig broyting er í mun til upprunaliga lendið, tá ið tyrvingarplássið er niðurlagt.

## 4 Óljóð, ristingar og ljós

4.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyristandandi mørk máld við næsta grannamark í viðkomandi økjum sambært kommunalu byggisamtyktini.

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán – frí | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leyg | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán – frí | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leyg | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

4.2 Í tíðarskeiðinum kl. 22-07 kann óljóð (løtuvirði) í bústaðarøkjum (øki 3 og 4) í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um omanfyrinevndu markvirði.
4.3 Virksemið skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av óljóði, íroknað lág- ella háfrekventum óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum. Um ampar verða av hesum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

## 5 Útleiðing til luft

5.1 Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað ikki hevur við sær ampar av royki, lukti ella dusti.
5.2 Um ampar verða av royki, lukti, dusti ella øðrum, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 6 Spillivatn

6.1 Alt spillivatn skal leiðast í kommunalu spillivatnsleiðing á sjógv.

6.2 Spillivatn skal viðgerast soleiðis, at evni og tilfar í størst møguligan mun verða tikin burtur, fyri at fyribyrgja dálking av umhvørvinum.
6.3 Spillivatn, sum inniheldur olju ella feitt, skal reinsast, t.d. við olju- ella feittskiljara.
6.4 Reinsiskipanir til spillivatn skulu reinsast og røkjast soleiðis, at tær altíð virka til fulnar, tó í minsta lagi eina ferð um árið.
6.5 Tað skal vera gjørligt at taka sýni av spillivatninum. Um spillivatnið verður reinsað, skal sýnið takast eftir reinsing.
6.6 Spillivatnið skal yvirhalda hesi markvirði, sí fylgiskjal 3.
6.7 Tórshavnar kommuna skal minst eina ferð um árið gera kanningar av frárensluvatninum, jørðsýni o.t., sum kann verða dálkað. Kanningarnar skulu gerast sambært kanningarskrá, sum frammanundan er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 7 Tilbúgving og óhapp

7.1 Gerast skal ein meting av møguligum vanda fyri óhappum, sum kunnu hava útlát av dálkandi evnum við sær.
7.2 Tórshavnar kommuna skal hava mannagongd til fyribyrging av dálkingaróhappum og til upprudding eftir møgulig óhapp.
7.3 Tórshavnar kommuna skal, um neyðugt, hava útgerð til upprudding eftir møgulig dálkingaróhapp.
7.4 Henda dálkingaróhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding.
7.5 Størri útlát ella dálking skal beinanvegin fráboðast til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

## 8 Innaneftirlit

8.1 Tórshavnar kommuna skal alla tíðina tryggja sær, at treytirnar í hesi góðkenning verða hildnar, um neyðugt við at gera egnar mátingar og skrásetingar.
8.2 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja skjalprógv fyri, at treytirnar í 4. parti, um óljóð, ristingar og ljós, 5. parti, um útleiðing til luft, og 6. parti, um spillivatn, verða hildnar.
8.3 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja, at kanningar verða gjørdar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkseminum.
8.4 Kanningar, sum eru ásettar í hesi góðkenning kunnu broytast, herundir víðkast, eftir nærri áseting frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
8.5 Sýnistøkur og kanningar skulu gerast av persóni ella felag, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka.
8.6 Sýnistøkur og kanningar skulu gjaldast av Tórshavnar kommuna.
8.7 Móttikin nøgd av burturkasti, skal skrásetast í góðkenda skipan fyri burturkastskráseting.
8.8 Tórshavnar kommuna skal arbeiða fram í móti at seta í verk eina hóskandi umhvørvisstýrisskipan, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Henda skal vera sett í verk innan 1. januar 2008.

## 9 Niðurlegging av tyrvingarplássinum

9.1 Tá ið tyrvingarplássið er endaliga afturlatið, hevur Tórshavnar kommuna ábyrgdina av at viðlíkahalda dren, rørleiðingar og onnur viðurskiftir á tyrvingarplássinum víðari framyvir.
9.2 Tórshavnar kommuna skal annaðhvørt ár í 20 ár eftir, at økið er afturlatið halda fram við at gera spillivatnskanningar og jørðsýniskanningar, sum áður, og lata úrslitini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.

9.3 Tórshavnar Kommuna skal hava regluligt eftirlit við økinum, og eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni lata gera hóskandi kanningar av spillivatni og jørðsýnum.
9.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann broyta áramálið ásett í treyt 9.2.
9.5 Heilsufrøðiliga starvsstovan skal góðkenna framtíðar ætlan fyri øki og rakstur av hesum. Henda ætlan skal verða Heilsufrøðiligu starvsstovuni í hendi í seinasta lagi 6 mánaðir aftaná at tyrvingarplássið er afturlatið.

## 10 Rakstrarskráseting

10.1 Hesar upplýsingar skulu skrásetast:
- Móttiknar nøgdir og slag av burturkasti.
- Nøgd av ilsku og flogøsku.
- Røkt av reinsiskipanum.
- Óhapp, sum hava havt útlát ella vanda fyri útláti við sær.
- Annað av umhvørvisligum týdningi.
- Úrslit og eygleiðingar (checklistar) í sambandi við innaneftirlit.

10.2 Skrásetingarnar skulu goymast í minsta lagi í 5 ár, og teir skulu vera til taks hjá eftirlitsmyndugleikanum.
10.3 Tórshavnar kommuna skal eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni senda inn rakstrarskrásetingar, úrslit av mátingum o.a. í hóskandi sniði og uppseting.
10.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan kann krevja aðrar skrásetingar enn tær, ið eru nevndar undir 10.

## 11 Almennar treytir

11.1 Tyrvingarplássið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskiftini, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.
11.2 Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á tyrvingarplássinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.
11.3 Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.
11.4 Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við tyrvingarplássinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.
11.5 Í 5 ár aftaná at góðkenningin er givin, kunnu nýggjar treytir bert ásetast, um so er, at:
- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

11.6 Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.
11.7 Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

**Fylgiskjal 2**
Listi yvir burturkast, sum skal beinast til ávikavist: brenningar, tyrvingar, serviðgerð ella endurnýtslu. Har ivamál eru, verður víst til Heilsufrøðiligu starvsstovuna at taka eina avgerð.
Listin skal endurskoðast regluliga.

1. Til brenning á eini av Heilsufrøðiligu starvsstovuni góðkendari brennistøð
Alt vanligt húsarhaldsburturkast, ið ikki kann endurnýtast
Alt plastikk uttan PVC
Gummi, sum ikki kann endurnýtast
Trol o.t. og bandleivdir, sum ikki kunnu endurnýtast (ansast skal eftir, at blýlodd eru tikin úr gørnum o.t.)
Burturkast stavandi frá sjúkrahúsi o.t.
Lívrunnið burturkast, sum ikki kann endurnýtast í aðrari framleiðslu ella nýtast í sambandi við taðing

2. Til tyrving á vanligum plássum
Alt vanligt tilfar, sum ikki er brennandi, sum ikki er serliga dálkandi, ella ikki kann fara í endurnýtsluskipan
Asfaltleivdir
Glas, sum ikki fer í endurnýtsluskipan, t.d. bilglas, rútaglas, sum inniheldur kitt
Rotvardur viður
Evja frá vegbrunnum og botnfellingarbrunnum, sum ikki eru íbundin klosett, ella innihalda lívrunnið burturkast
Oljudálkað jørð eftir meting av dálkingarpoteniali
Asbestburturkast (skal hava serligt avmerkt øki)
Botnsediment eftir meting av dálkingarpotentiali
Ilska og flogøska frá brennistøðum (á serliga góðkendum tyrvingarplássum)
Battarí, ið innihalda minni enn 0,025% Hg (á serliga góðkendum tyrvingarplássum)

3. Til móttøku í sambandi við serviðgerð
Alt, sum er nevnt á lista yvir serliga dálkandi burturkast sambært kunngerð nr. 147/1995, og sum ikki kann burturbeinast á annan hátt sambært hesum fylgiskjali skal sendast til góðkendan móttakara. Fráboðan um móttakara skal sendast Heilsufrøðiliga starvsstovuni.

4. Til goymslu ella nýtslu sum ífylla uttan góðkenning
Mold, eyrur, sandur
Sankutøð (t.d. lívrunnið burturkast frá húsarhaldum, tá ið hetta verður sankað)
Greinar, bløð, gras og tílíkt frá urtagørðum og landbúnaði
Betongleivdir

5. Til góðkend evjupláss
Evja frá rottangum og reinsiverkum

6. Til góðkenda endurnýtslu
Bildekk
Bilvrak
Hvítvørur o.t. sum kann innihalda CFC og onnur halonir
CFC og onnur halonir
Jarn og metal, sum kann burturbeinast til endurnýtslu
Alt slag av glasi (glasbrot, øll sløg av fløskum, rútaglas, niðursjóðingargløs og luktilsisgløs)
Pappír
Spilliolja
Trol
Stórsekkir

# Fylgiskjal 3
# Sýnistøka og markvirði fyri tyrvingarplássið í Húsahaga

### Talva 1. Markvirðið fyri útleiðing og vanliga sýnistøku av spillivatni

| Parametur | Markvirði | Kanningartíttleiki |
|---|---|---|
| Pb (Blýggj, mg/l) | 1,5 | Minst einaferð um árið skulu sýnistøkur gerast av spillivatni |
| Cd (Cadmium, mg/l) | 0,1 | |
| Hg (Kyksilvur, mg/l) | 0,003 | |
| Cr (Krom, mg/l) | 0,2 | |
| Kopar (Cu, mg/l) | 0,5 | |
| Ni (Nikkel, mg/l) | 0,5 | |
| Fe (Jarn, mg/ml) | 500 | |
| Zn (Zink, mg/l) | 1,0 | |
| pH | 6,5-9,0 | |
| Leiðingarevni | - | |
| Olja (mg/l) | 10 | |

### Talva 2. Markvirðið fyri útleiðing og víðkaðari sýnistøku av spillivatni

| Parametur | Markvirði | Kanningartíttleiki |
|---|---|---|
| As (Arsen, mg/l) | 1,0 | Tá Heilsufrøðiliga starvsstovan umbiður víðkaða kanning |
| Mo (Molybden, mg/l) | 1,0 | |
| Se (Selen, mg/l) | 0,05 | |
| V (Vanadium, mg/l) | 0,5 | |

### Talva 3. Markvirði fyri jørðkanningar

| Parametur | Markvirði | Kanningartíttleiki |
|---|---|---|
| pH | - | Minst einaferð um árið skulu jørðkanningar gerast |
| Turrevni (T.E) | - | |
| Pb (Blýggj, mg/kg) | 40 | |
| Cd (Cadmium, mg/kg) | 0,5 | |
| Hg (Kyksilvur, mg/kg) | 0,2 | |
| Cu (Kopar, mg/kg) | 30 | |
| Ni (Nikkel, mg/kg) | 2,6 | |
| Fe (Jarn, mg/kg) | 42000 el 4,2% | |
| Zn (Zink, mg/kg) | 300 | |